tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Orðaskifti um framtíðar vinnu og árin

Oddagrein

Í kvøld klokkan 19.30 verður skipað fyri einum almennum orðaskiftisfundi í útvarpshøllini. Evnið er „Oljuríkidømi og samfelagslig árin“. Hetta er eitt evni, sum ikki hevur verið so nógv viðgjørt í tí almenna tjakinum, og tað hevur helst sínar orsøkir. Fyrst og fremst tann, at vit í dag ikki vita, um nøkur olja finst í undirgrundini og finst hon, tá vita vit heldur ikki, um talan verður um eina stóra framtíðar vinnu. Ein onnur orsøk er so tann, at meðan 80-árini vórðu brúkt til at tosa um ognarrættin til undirgrundina, so vórðu 90-árini merkt av marknatrætuni við bretar umframt sjálvari tí fysisku fyrireikingini til fyrstu leiting á landgrunninum. Nú eru vit so farin inn í eina nýggja øld - vit hava sett hol á ár 2000 - og er tí eisini stundin komin til at tosa um árin tað verið seg positiv og negativ - av eini komandi leiting og framleiðslu. Tað er eisini ein sannroynd, at almenna kjakið øll hesi seinastu árini hevur verið merkt av mongum stórum og álvarsligum málum.

NÚ undirgrundin er komin á føroyskar hendur - nú markið við Bretland er komið uppá pláss, og nú tingið hevur samtykt 1. útbjóðingina, er rætt at seta hol á umrødda kjakið. Og hetta eigur at verða gjørt bæði í fjølmiðlunum, á tingi og á slíkum tjakfundum, sum Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag skipar fyri í kvøld. Vit hava annars á hesum stað lagt upp til, at Norðurlandahúsið komandi árini verður karmur um ráðstevnur, hoyringar ella hvat tað nú kann eita, har nettupp framtíðar oljuvinnan og árin hennara á okkara lítla samfelag, verða viðgjørd. So „hoyringin“ í útvarpshøllini í kvøld er ein frálík upphiting - ein góður botnur at leggja í so máta.

TAÐ er ynskiligt, at vit fáa eitt uppbyggjandi og konstruktivt orðaskifti, har flest allir tættir í hesum stóra máli verða tiknir upp. Verður olja funnin, hvussu brúka/burturleggja vit inntøkurnar skilabest? Hvussu vilja vit búgva okkum út til at taka ímóti hesi vinnu, eitt nú á íbúðarøkinum, á barnagarðs- og skúlaøkinum, hvussu er stætt við gistingarhúsum, við hølum til skrivstovur, ja við arbeiðsmegi, fólki til at manna størvini í nýggju vinnuni? Fer nýggja vinnan at skapa trot á arbeiðsfólki í øðrum vinnum, verða vit noydd at innflyta fólk uttanífrá? Hvussu við umhvørvinum, hvussu við mentanarlívinum osfr. Og tú kanst venda øllum hesum og spyrja, hvussu kann nýggja vinnan geva íblástur og skapa nýggjar karmar innan bæði vinnulív og mentan! Hetta og annað eru spurningar vit nú eiga at seta hol á.

Sosialurin

Viðmerking:

Loyniloysingin:

Ríkisrættarligt gyrðislop

Loysingarkós samgongunnar fer at hava við sær ríkisrættarligan hurlivasa, har valds- og ábyrgdarbýti verður rótfest í bláari luft.

Tá samgongan roynir at sannføra okkum um, at vit eiga at stuðla hennara kós í ríkisrættarspurninginum, brúka tey aftur og aftur nøkur tølandi gandaorð at balla veruliga innihaldið inn í.

Við messandi uppafturtøku verða hugtøk sum greiðar linjur, greitt ábyrgdarbýti, greitt valdsbýti, evstavald og samstarv á jøvnum føti knýtt at ætlan samgongunnar. Men enn vantar ein útgreining av, hvussu alt hetta hongur saman við ætlaða politikkinum. Enn er hetta ikki annað enn glæstrimyndir.

Delegeringshurlivasin

Kjarnin í samgonguætlanini er, at tey sum fyrsta stig

"- opretter Færøerne som en fri og suveræn stat"

og at henda loysing

"- bliver meddelt FN og forankret i folkeretten"

sum tað stendur í almennu fráboðanini frá Landsstýrinum,ið er send øllum donskum politikkarum.

Hetta er - siga tey - fyri at knæseta at evsta vald og evsta ábyrgd er hjá Løgtinginum.

Men í sama andadrátti grugga tey valds- og ábyrgdarbýti. Tey ætla ikki, at hesin suverenitetur skal verða annað enn kosmetikkur. Tí beinanvegin skulu málsøkini "afturdelegerast" til danir at umsita.

Ásannandi, at vit ikki uttan nakað kunnu átaka okkum umsitingina av stórum málsøkjum - sum t.d. dóms- og løgreglumál - hvørki fíggjarliga, fyrisitingarliga ella starvsfólkaliga annars, ætla tey at tveita ábyrgdina og valdið út í bláan heim.

Hetta merkir, at vit fyri øllum heiminum skulu kunngera, at nú hevur Føroya Løgting evsta vald og evstu ábyrgd av øllum málsøkjum. Men samstundis skulu vit biða embætisverkið í einum øðrum "fri og suveræn stat", nevniliga danska embætisverkið, umog fyrisita veldug málsøki.

Fløkt ábyrgd

Í Danmark hava tey ráðharraábyrgd. Tað merkir, at um danskt embætisverk fremur eitthvørt fyrisitingarligt misbrot, so er tað danski ráðharrin, sum í síðsta enda ábyrgdast.

Men hvør, ið ábyrgdina hevur, um danskt embætisverk fremur fyrisitingarligt misbrot í umsitingini av málsøki hjá fría og suverena statinum Føroyum, ber ikki til at siga. Um danska embætisverkið innan dómsvaldið fremur misbrot í fyrisitingini av føroyska - útliciterða - dómsvaldinum, ber ikki til at siga, hvørt tað er føroyski landsstýrismaðurin í lógarmálum, ella tað er danski justitsministarin, ið hevur ábyrgdina.

Soleiðis arbeiðir samgongan í rama álvara við eini skipan, ið ger ábyrgdarbýtið meira fløkt enn tað nakrantíð hevur verið. Ja, ein skipan har øll ella ongin hevur ábyrgdina.

Fløkt vald

Í spurninginum um valdsbýti rennur samgongan seg í sama trupulleika. "Færøerne som en fri og suveræn stat" skal afturdelegera málsøki. Og hvørið hevur lóggávuvaldið á hesum málsøkjum, ber ikki til at siga.

Danska embætisverkið virkar eftir danskari lóggávu og undir donsku rættarskipanini. Eftir hvørji lóggávu danska embætisverkið skal umsita málsøki hjá fría og suverena statinum Føroyum, ber ikki til at siga. Men fáur man ivast í, at danskir myndugleikar fara klárt at vísa aftur, at leggja partar av danska embætisverkinum undir lóggávuvaldið hjá einum øðrum stati - og tað í óásetta tíð. Og tá hava vit á hesum øki somu fløkju, sum í spurninginum um evstu ábyrgd. Ein skipan har øll ella ongin hevur lóggávuvaldið.

Ófyrireika

Í veruleikanum arbeiðir samgongan fram ímóti eini stødu, har Føroyar í mong ár verða stýrdar eftir umsum "hovsa loysnum". Tey dylja, at í roynd og veru fer teirra politikkur at merkja, at vit fáa minni sjálvstýri og minni sjálvræði enn frammanundan, tí ongar veruligar fyrireikingar verða gjørdar at taka á seg vald ella ábyrgd.

Tvørturímóti at loysa vandamálini við ógreiðum valds- og ábyrgdarbýti, skapar samgongukósin enn størri ógreiðu. Tvørturímóti at finna fram til eina virðliga, veruliga og varandi loysn á ríkisrættarspurninginum, ætlar samgongan at gera nakað, sum mest av øllum minnir um ríkisrættarligt gyrðislop.

Gyrðislopið (bungy jump) er eyðkent av at tú lætst loypa út í fría lopið, men tá til stykkis kemur, ert tú íbundin eitt elastikk, sum varveitir sambandið við pallin, so tú allíkavæl ikki ert leysur - bert hjálparleysur. Tá tú so hongur og darlar við elastikkendan mugu hjálparfólk toga teg upp á turt aftur.

Fáfongd

Her er ikki talan um eina væl skipaða verkætlan, sum hevur til endamáls at vinna føroyingum og landi okkara stærri frælsi og víðari ræsur. Nei, tess meira vit kanna politikkin hjá samgonguni, tess týðiligari kemur fram, at her fyrst og fremst er talan fáfongd.

Samgongan ætlar at bjóða føroyingum eina óvirðiliga ikki-loysn í ríkisrættarspurninginum. Tí kunnu tey heldur ikki krevja, at øll onnur tigandi skulu svølgja.

Bergur P. Dam

†

Kunngjørt verður at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

ANNA KATHRINA HEINESEN
Leirvík

andaðist týsmorgunin 29. feb., 81 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju fríggjadagin 3. mars kl. 14.00.

Tey, sum ynskja at lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Sjómanskvinnuringin í Leirvík.

Vegna tey avvarðandi
Børnini

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

HANSINA DEBES
Havn, ættað frá Gjógv

andaðist og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til sangarar og Jukim Olsen fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjugarðinum. Takk fyri blómur og kransar og takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Marna, Herdis, Hans Jacob, Petur, Poula, Jacoba, Mary, Oda, Ellintur og Sonja

Rio Bravo 10 ár

Hósdagin 2. mars 2000 eru 10 ár liðin síðani, at matstovan Rio Bravo lat upp í Havn. Í hesum sambandi verður skipað fyri ymiskum tiltøkum um vikuskiftið í Casablanca og Manhattan. M.a. verður bjóðað viðskiftafólkum ókeypis pinnamat bæði hóskvøldið og fríggjakvøldið.

Stórhendingar fyri Rio Bravo hesi seinastu tíggju árini hava verið, at Rio Bravo í 1995 flutti úr Kongagøtu oman í ovaru hædd í bygninginum í Tórsgøtu, har matstovan heldur til nú. Í 1996 lat Casablanca upp í niðaru hæddini og síðsta ár sá pub-caféin Manhattan dagsins ljós.

Tann seinasta stórhendingin er, at Faxe er farin at samstarva við Rio Bravo, og hevur m.a. valt at stuðla í teimum tiltøkum, ið verða hildin í Casablanca og Manhattan. FAXE er eitt av størstu sodavatns- og ølbryggjarívum í Danmark, og meta teir at Rio Bravo, Casablanca og Manhattan eru væl egnað stað til at marknaðarføra teirra vørur.

Trý vórðu fødd

Tríggir nýggir føroyingar vórðu føddir týsdagin 29. februar.

Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi kom ein drongur til verðina, og á Landssjúkrahúsinum í Havn vórðu ein genta og ein drongur fødd.

Hesi trý børnini sleppa bara at halda rættiligan føðingardag fjórða hvørt ár restina av lívinum.

Sambært Útvarpi Føroya eru 44 føroyingar á lívi, sum eru føddur 29. februar, og besta leypárið, tá talan er um nýfødd, var 1996, tá seks børn vórðu fødd.

Oljurisi innivist á Kongabrúnni

JAN MÜLLER

Ein av treytunum fyri at kunna leita eftir olju á føroyska landgrunninum er, at oljufeløg skráseta seg í Føroyum og lata sítt virksemi ganga út frá Føroyum. Tvs. at feløgini skulu hava skrivstovur og fólk. Longu nú hava fleiri oljufeløg latið upp skrivstovur í Havn og hava í umbúnað at lata upp.

Stóra oljufelagið BP Amoco, eitt av slagskipunum í altjóða oljuvinnuni og avgjørt flaggskipið á Atlantsmótinum við tveimum framleiðandi oljufeltum, fer um stutta tíð at lata upp skrivstovu í Havn. Sosialurin skilur, at felagið skal hava gjørt sáttmála við Kristjan á Neystabø, sum eigur húsini á Skansavegi 1. Miðjað verður eftir at lata upp skrivstovuna 1. apríl. Hetta hava vit tó ikki fingið váttað enn. Føroyskur umboðsmaður hjá BP Amoco er Hjarnar Djurhuus, fyrrv. stjóri í Shell.

Stamarar fingið egið felag

Í januar mánað var hildin stovnandi aðalfundur í MBF húsinum.

Byrjað var við einum fyrilestri. Danski talilærarin Kirsten Thyme greiddi frá arbeiði sínum við fólki, við stamitrupulleikum.

Síðani var felagið sett á stovn og avgjørt var, at navn felagsins skuldi verða Høgættarfelagið.

Øll eru vælkomin at gerast limir í felagnum. Áhugað kunnu seta seg í samband við Høgættarfelagið, Jóhan Jacobsen, tlf. 313379 ella e-mail@post.olivant.fo

Venus verður klárur aftur

Línuskipið Venus, sum fekk maskinskaða fyri tveimum vikum síðani verður klárur at fara aftur til fiskiskap um vikuskftið

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyri tveimum vikum síðani fekk línuskipið Venus úr Sandavági maskinskaða, meðan teir vóru til fiskiskap.

Skipið varð sleipað til Havnar, har tað varð staðfest, at brek var á umstýringini, samstundis sum aksilin eisini hevði fingið onkran snudd.

Tað vísti seg at vera trupult at fáa eykalutir til umstýringina. Einki var at finna hvørki í Føroyum ella í Noregi og tí mátti luturin gerast. hetta hevur tikið nakað av tí, men er nú fingið upp á pláss.

– Mánadagin kom so seinasti luturin og Venus verður liðugt umvældur móti endanum á vikuni, sig-ur Hálvdan Gudmundsen, reiðari.

Óhappið kom sjálvsagt illa við, tí fiskiskapurin var júst komin aftur á eitt rímiligt støði, tá óhappið hendi, men kortini heldur reiðarin ikki, at tað hevur verri enn ilt.

– Tað hevur viðrað illa hjá bátunum nú meðan vit hava ligið við bryggju, so í so máta vóru vit ikki so óhepnir, sigur hann.

Sum sagt, so væntar hann, at umvælingararbeiði verður liðugt síðst í vikuni og viðrar so fer Venus aftur til fiskiskap um vikuskiftið.

Dygdarvørur frá Telebúðunum

PRÍSUR VIÐ MVG
2195,-
Ericsson 260 KIT
Tann tráðleysa Ericsson 260 er ein framkomin digital Dect-telefon – formgivin og evnað til at gera lívið meira hugaligt heima. Telefonin hevur "vís nummar", soleiðis at tú sært, hvør ringir og hvør hevur ringt. Eisini hevur hon innbygdan telefonsvarara, sum svarar teimum uppkøllum, tú ikki nært.

PRÍSUR VIÐ MVG
495,-
Høvuðssett v/útvarpi til Ericsson fartelefonir
Høvuðsettið hevur innbygt útvarp, soleiðis at tað bæði virkar sum útvarp og høvuðsett. Um tú lurtar eftir útvarpinum, og telefonin ringir, verður útvarpið sjálvvirkandi sløkt og telefonin er klár at svara. Kann brúkast til A1018, T18, T10, R250, PRO, 600, 700 og 800 røðirnar.

PRÍSUR VIÐ MVG
395,-
Ericsson CHATBOARD™
CHATBOARD™ - sum er eitt lítið og harðført knappaborð til fartelefonir, ger tað nógv lættari og nógv, nógv skjótari at skriva SMS boð, og telefonboks-knappurin ger tað skjótari at leggja nummur inn í telefonbókina. CHATBOARD™ kann brúkast til telefonirnar T10s, A1018s, T18s, R250s PRO, I888 WORLD, SH888, S868 og GF788e.

pétur & pétur - 320870

TELEBUÐIN
Tórshavn 31 70 10 • Tvøroyri 37 10 00 • Søldarfjørður 44 10 00
Norðurstreymoy 42 10 00 • Klaksvík 45 74 88 • Sandur 36 10 00 • Miðvágur 33 20 00